


Nú liggur heimurin opin fyri frambrotum og nýskapan. Føroya Tele hevur lagt virksemið og bygnaðin um. Felagið er liðað sundur í smidligar eindir, eitt móðurfelag og fleiri dótturfeløg, so tað er vorðið meira dynamiskt. Í hesum sambandi hava vit tørv á dugnaligum og framfýsnum starvsfólkum, sum vilja vera við til at flyta Føroyar inn í nýggjar tíðir.

## Samtakið Føroya Tele

Samtakið Føroya Tele er móðurfelag. Sum landsins størsti veitari av kunningar- og fjarskiftistænastum er samtakið Føroya Tele ein hin týdningarmesta fyritøkan í føroyska vinnulívinum. Visjónin hjá Føroya Tele er at verða ”fremst í framburðinum - sum fyritøka og sum fyrimynd”. Hetta áleggur samtakinum at tryggja føroyingum fremstu tøkniligu menningina og at virka fyri at skapa nýggjar vinnur til frama fyri bæði íleggjaran og samfelagið. Andras Róin er stjóri í samtakinum Føroya Tele.
Umframt dótturfeløgini FT Net og FT Samskifti fevnir samtakið eisini um Televarpið. Harumframt hevur eindin FT International til endamáls at skapa nýtt virksemi uttanlands fyri at økja um samlaða "føroyska" fjarskiftis- og kt-marknaðin.

**Samtakið Føroya Tele søkir:**
- eitt fíggjarfólk

*Les um starvið á www.tele.fo*

## FT Net

FT Net er dótturfelag hjá Føroya Tele. Høvuðsendamálið hjá felagnum er at tryggja øllum tænastuveitarum í Føroyum innan fjarskifti eina javnbjóðis atgongd til fjarskiftisundirstøðukervið og at geva eina góða og skjóta veiting av tøkniliga dagførdum kervistænastum. Við nýggja bygnaðinum fæst økt fíggjarligt gjøgnumskygni og trygd fyri, at tænasturnar, sum eru knýttar at fjarskiftiskervinum verða veittar við javnbjóðis heilsølutreytum. Páll H. Vesturbú er stjóri í FT Net.
Í felagnum starvast umleið 70 fólk.

**FT Net søkir:**
- eitt fólk til rakstur, viðlíkahald og prosjektering av veik- og sterkstreymi
- ein verkfrøðing

*Les um størvini á www.tele.fo*

## FT Samskifti

FT Samskifti er dótturfelag hjá Føroya Tele. Í nýggja felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarútgerð fyri fastnettelefoni og breiðband. Broytingin til nýggja dótturfelagið er við til at tryggja eins treytir fyri kappingarneytarnar á marknaðinum. Hesir nýggju karmarnir geva nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Richard Mortensen er stjóri í FT Samskifti. Í felagnum starvast umleið 100 fólk.

**FT Samskifti søkir:**
- eitt fólk til innkeyp og sølu
- ein tøkniligan produktleiðara (PM-breiðbandserfrøðing)
- tveir samskiftistøkningar
- tveir IP-vegleiðarar
- tvey kunningarfólk til Telebúðina á Tvøroyri

*Les um størvini á www.tele.fo*

FØROYATELE

Tel 303030, Fax 303031, ft@ft.fo, www.tele.fo